# Fulli títtleikin av teim ymsu húðsjúkunum hjá eini tjóð.

## Ein teljing úr Føroyum.

*Eftir Gunnar Lomholt.*

Kynsjúkum viðvíkjandi fæst úr vikuskráum og heilsulagslýsingum gott yvirlit yvir fyrikoming teirra hjá fólkinum, ja, eins og tað skilst ber til at eygleiða tær viku eftir viku.

Heilt øðrvísi er at døma um útbreiðsluna av húðsjúkunum. Sigast kann: »Hvør menniskja hevur onkra húðsjúkuna«. Hetta er eyðvita rætt, tí at hvør man hann vera, ið ikki hevur okkurt móðurmerki, eitt sindur av flusi, líktorn ella seborrhoiskan hármiss. Men tá er spurningurin í hesum sambandi vorðin heilt høpisleysur.

Vilja vit meta um, hvørji í fólkinum eru fongd við rættiligum húðsjúkum, og hvussu lutfallið er teirra millum, noyðast vit bert at fara fram eftir ætli. Helst eru tað ársfrágreiðingar frá sjúkrahúsunum, ið tøkar eru. Men tær geva onga álítandi mynd, tí at sjúkrahúsini fevna til dømis ikki yvir týðiliga avmarkað øki og taka ei heldur við frá hesum øki allar sjúklingar, ið hava húðsjúkur, ið meira og minni krevja viðgerð.

Men higar til dags hevur hetta verið einasta leiðin til at meta um fyrikoming sjúkanna, og hvussu tær skiftast sundur sínámillum. GOODMAN (1929) hevur kunngjørt tað

rúgvismesta tilfarið, ið enn er til; har eru upplýsingar givnar um umleið 1 millión tilburðir av húðsjúkum, ið viðgjørdar eru av húðlæknum og á húðdeildum í Ameriku (1. talva).

1. talva. 1 millión tilburðir av húðsjúkum.
*One million cases with skin diseases.*
Goodman, 1929.

| | |
|---|---|
| 1. Eczema | 22,3 % |
| 2. Acne | 9,1 % |
| 3. Scabies | 4,6 % |
| 4. Impetigo | 4,3 % |
| 5. Psoriasis | 4,1 % |
| 6. Urticaria | 3,9 % |
| 7. Seborrhoea | 3,7 % |
| 8. Dermatitis venenata | 3,0 % |
| 9. Tinea | 2,5 % |
| 10. Alopecia | 2,5 % |
| Tilsamans *Total* | 60,0 % |

Hesar 10 sjúkuavgerðir fevna so statt um 60 % av sjúkuavgerðunum hjá 1 millión av sjúklingum, ið fingið hava viðgerð fyri húðsjúku. Okkum tykir dagliga, at starvsøki okkara er avbera fjølbroytt, og hvønn dag hava vit um hendur stórt tal av ymisligum sjúkuavgerðum, men verður málið einfaldað, sæst, at duga vit væl 10—12 ymsar húðsjúkur, eru vit førir fyri at viðgera meginpartin av húðsjúklingum okkara.

Á samsvarandi hátt havi eg roynt at seta upp røðina av húðsjúkutilburðum í Danmark. Eg havi gjørt tað við úrdrátti úr seinastu ársfrágreiðingunum frá Finsensinstituttet og Rigshospitalet í Keypmannahavn (2. talva).

Orsakað av teim serstøku tilvísingarviðurskiftunum á Finsensinstituttet havi eg fyrst tikið frá allar kambfjaðrar (Rasmussen 1958). Har umframt eru tiknir frá allir tilburðir við líktornum og hármissi.

Eins og í tilfari Goodmans standa eczem, acne, psoriasis, epidermophyti og pityriasis ovarlaga í húðsjúkurøðini. Men eins og áður nevnt, sigur tað lítið um, hvussu sjúkurnar

2. talva. Finsensinstituttet í Keypmannahavn 1959
8035 húðsjúkutilburðir.
*8035 cases of skin diseases.*

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Eczema | 16,9 o/o |
| 2. | Naevi, fibromas, and angiomas | 13,3 – |
| 3. | Acne vulgaris | 5,7 – |
| 4. | Psoriasis | 5,2 – |
| 5. | Pityriasis and pityroid eczema | 4,3 – |
| 6. | Epidermophytosis | 3,6 – |
| 7. | Alopecia areata | 2,3 – |
| 8. | Cancer of the skin | 2,2 – |
| 9. | Besnier's prurigo | 2,0 – |
| 10. | Neurodermatitis | 1,7 – |
| | Tilsamans *Total* | 57,2 0/0 |

Rigshospitalet í Keypmannahavn
3002 húðsjúkutilburðir.
*3002 cases of skin diseases.*

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Eczema | 24,5 0/0 |
| 2. | Pityriasis simplex and pityroid eczema | 8,1 – |
| 3. | Psoriasis | 5,0 – |
| 4. | Acne vulgaris | 3,7 – |
| 5. | Besnier's prurigo | 3,5 – |
| 6. | Impetigo | 3,4 – |
| 7. | Epidermophytosis | 3,2 – |
| 8. | Neurodermatitis | 2,9 – |
| 9. | Urticaria | 2,5 – |
| 10. | Pityriasis rosea | 2,3 – |
| | Tilsamans *Total* | 59,1 0/0 |

býta seg sundur hjá sjálvum fólkinum. Ymsir rannsóknarmenn hava roynt at gjørt grein í býtingini við at kanna avmarkaðar fólkabólkar eins og innstevndar hermenn (BERESTONE & CECCOLINI 1943), sjúklingar á stovnum (BUTTERWORTH & WILSON 1938), studentar á studentagørðum (GILMAN 1934, ALDERSON & REICH 1937). Slíkar kanningar hava tað eyðsædda brek, at tær røkka til ógvuliga lítlan úrskurð av fólkinum.

Enn hevur eingin á skipaðan hátt talt húðsjúkur hjá eini tjóð.

Í 1948 framdi eg eina sjúkuteljing á 11.000 fólkum í Føroyum, og var hetta triðingurin av øllum íbúgvum landsins, 30.000 (LOMHOLT 1953 og 1954). Endamálið við teljingini var at gera av fyrikomingina av psoriasis hjá føroyingum og serstakliga at lýsa, hvussu henda sjúka av sær sjálvari tók seg upp, og harumframt at fáa til vega tilfar til arvalívfrøðiliga rannsókn.

Saman við hesari fyrstu uppgerð gjørdi eg skipaða skráseting av øllum húðsjúkum á tí kannaða økinum. Eg havi vitjað inn í øll 1915 húsini við 2341 húskjum.



1. mynd.

Kannaða økið eru tær 7 oyggjarnar ið liggja eystanfyri markaskjalið.

*The counting includes the 7 islands to the north east of the dividing line.*

Við tað at leitað var eftir hvørjum einasta psoriasistilburði, hvussu lítil hann var, og leitanin eftir psoriasistilburðum, sum í løtuni vóru eyðkennisleysir, var av megintýdningi, er hesin bólkur ikki hóskandi til samanburðar við hinar. Viðvíkjandi hinum húðmeinunum eru bert teir sjúklingar skrásettir, ið sjálvir hava givið seg til. Tilsamans eru tað 567 fólk, ið skrásett eru við til samans 663 ymisligum húðsjúkum.

Eins og áður nevnt var tað ikki endamálið við hesi kanning at fáa við hvønn tilburð av acne, eins og t. d. evarskasmáir tilburðir av pityriasis, ið finnast hjá so ómetaliga mongum, høvdu spilt eina skilagóða sundurskifting av sjúkunum. Harafturat er høvdalúsin útihýst beinan vegin. Tílík kanning er sjáldan dámd. Hon var tó alt annað enn sjáldsom.

Somuleiðis er kropslúsin ikki tikin við. Henda plágan er til í einstøkum avbyrgdum fátækum bygdum og serstakliga hjá gomlum fólki, ið ikki gera ov nógv burtur úr reinføri. Tá ið tað er royndur lutur, at hesi fólk hava givið seg undir hesa plágu, koma tey ikki við.

Tá ið frátiknar eru kambfjaðrar (verrucae vulgares), ið føroyingar meta við somu líkasælu og danskt bygdarfólk, átti uppgerðin yvir hinar húðsjúkurnar at verið álítandi.

Á 2. mynd eru mannfólk og konufólk skift sundur eftir aldri. 32 sjúklingar vóru yngri enn 1 ár (6 %), 88 vóru børn yngri enn 10 ár (16 %), og 32 vóru farin av 70 (6 %).

Meðan eg skrásetti sjúkuavgerðina, skilaði eg eisini til sjúkustigið. Mær tókti, at slík uppseting hevði lítið virði, um ikki samstundis kundi fáast hylling á, hvussu nógv hvør einstøk sjúka gjørdi um seg. Eg havi býtt sundur í hesi 3 stig.

1. stig: her eru at finna allir linir tilburðir, teirra millum nøkur sum helst ikki høvdu leitað til lækna í vanligum umstøðum.




2. mynd. Mannfólk og konufólk skift sundur eftir aldri.
*Males and females according to age.*

2. stig: tað fevnir um allar rættiligar tilburðir við húð-sjúkum, soleiðis ikki bert vanligar viðgerðar-tørvandi tilburðir, men eisini nøkur reiðiliga stór og eyðkennilig útbrot.

3. stig: í henda bólk eru settir allir stórtilburðir, nakrir teirra áttu at verið viðgjørdir á sjúkrahúsi.

Av 3. talvu skilst, at 14 % av tilburðunum eru skrá-settir sum grefligir tilburðir, 36 % sum linir og 50 % eru miðalringir tilburðir. Sundurskiftingin hjá mannfólki og konufólki er merkiliga lík.

4. talva sýnir fulla títtleikan av 15 teim vanligastu húð-sjúkunum í Føroyum. Títtleikin av psoriasis er funnin at vera 2,84 %, men í hesum yvirliti eru tikin frá tey 11 % av sjúklingum, sum í løtuni ikki bera merki av psoriasis. Hóast henda frádrátt, er psoriasisbólkurin ikki nær ella

námindi samanberandi við hinar sjúkubólkarnar. Títtleikin av húðsjúkum í Føroyum er eftir mínari teljing 5,6 %; harafturat koma tey 2,5 % við psoriasis, so at úrtøkan er umleið 8 %.

Tað sæst, at *eczem* er tíðasta húðsjúkan – hon kemur fyri við umleið 1,5 %. Síðan koma pityriasis og pityriasis

3. talva. Sjúkustigið hjá mannfólki og konufólki.
*Graduation of the disease according to sex.*

| | Mannfólk *Males* | | Konufólk *Females* | | Mannfólk og konufólk *Total* | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal | % | Tal | % | Tal | % |
| 1. bólkur...... | 88 | 32 | 148 | 38 | 236 | 36 |
| 2. bólkur...... | 142 | 52 | 190 | 49 | 332 | 50 |
| 3. bólkur...... | 44 | 16 | 51 | 13 | 95 | 14 |
| Tilsamans *Total* | 274 | | 389 | | 663 | |

4. talva. 15 tær tíðastu húðsjúkurnar í Føroyum.
*The most frequent skin diseases in The Faroe Islands.*

| | | | | Reinur títtleiki |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Eczema .................. | 169 | fólk | 1,54 % |
| 2. | Pityriasis and pityroid eczema | 116 | » | 1,05 – |
| 3. | Neurodermatitis .......... | 48 | » | 0,44 – |
| 4. | Acne vulgaris ............ | 33 | » | 0,30 – |
| 5. | Besnier's prurigo ......... | 17 | » | 0,15 – |
| 6. | Ulcer of the leg .......... | 17 | » | 0,15 – |
| 7. | Alopecia areata ........... | 15 | » | 0,14 – |
| 8. | Lichen ruber ............. | 14 | » | 0,13 – |
| 9. | Ichthyosis ............... | 12 | » | 0,11 – |
| 10. | Impetigo ................. | 12 | » | 0,11 – |
| 11. | Rosacea .................. | 10 | » | 0,09 – |
| 12. | Scabies .................. | 8 | » | 0,07 – |
| 13. | Perniosis ................ | 7 | » | 0,06 – |
| 14. | Vitiligo ................. | 7 | » | 0,06 – |
| | (Psoriasis ................ | | | 2,5 –) |

Títtleikin av húðsjúkum í Føroyum: 8,1 %.
*The incidence of skin diseases in the Faroe Islands: 8,1 p.c.*

5. talva. Títtleikin av húðsjúkum. Føroyar samanbornar við Finseninstituttet og Rigshospitalet í Keypmannahavn.

*The relative incidence of skin diseases. The Faroe Islands compared with Finseninstitutet and Rigshospitalet in Copenhagen.*

| | Føroyar | | Finseninstituttet í Keypmannahavn | Rigshospitalet í Keypmannahavn |
|---|---|---|---|---|
| | absolute | relative | relative | relative |
| 1. Eczema | 1,54 % | 25,5 % | 16,9 % | 24,5 % |
| 2. Pityriasis and pityroid eczema | 1,05 – | 17,5 – | 4,3 – | 8,1 – |
| 3. Neurodermatitis | 0,44 – | 7,2 – | 1,7 – | 2,9 – |
| 4. Acne vulgaris | 0,30 – | 5,0 – | 5,7 – | 3,7 – |
| 5. Besnier's prurigo | 0,15 – | 2,6 – | 2,0 – | 3,5 – |
| 6. Ulcer of the leg | 0,15 – | 2,6 – | 1,1 – | 1,7 – |
| 7. Alopecia areata | 0,14 – | 2,3 – | 2,3 – | 0 – |
| 8. Lichen ruber | 0,13 – | 2,1 – | 0,8 – | 1,0 – |
| 9. Ichthyosis | 0,11 – | 1,8 – | 0,3 – | 0,5 – |
| 10. Impetigo | 0,11 – | 1,8 – | 1,2 – | 3,4 – |
| 11. Rosacea | 0,09 – | 1,5 – | 1,1 – | 0,9 – |
| 12. Scabies | 0,07 – | 1,2 – | 0 – | 2,3 – |
| 13. Perniosis | 0,06 – | 1,0 – | 0,3 – | 0,6 – |
| 14. Vitiligo | 0,06 – | 1,0 – | 0,7 – | 0,4 – |
| Psoriasis | (2,5 –) | | 5,2 – | 5,0 – |

eczem við umleið 1 %, og triðja í røðini er neurodermatitis við umleið 1/2 %. Á hesum stað ætli eg ikki at geva nærri viðmerkingar við hesi tøl, bert skal eg vísa á, at tá ið farið er út millum fólk til at kanna eftir, hvørjar sjúkur tey í løtuni hava at dragast við, verður funnið nógv størri tal av tráum húðsjúkum, meðan hinar bráðu, ið heldur ofta koma fyri á viðtalsstovum ella í sjúkrahústilfarum, skiftast javnt sundur gjøgnum alt árið. Tessvegna er heldur lítið tal av hesum meinum at finna ein einstakan kanningardag.

Til tess at gera tølini samanberandi, havi eg í 5. talvu gjørt upp lutfalsliga títtleikan og borið saman við tilfarið frá Finsensinstituttet og Rigshospitalet í Keypmannahavn. Vit síggja, at fulli títtleikin 1,5 % hjá eczemi verður til lutfalsligan títtleika á 25 %, ið hóskar væl saman við títtleikan í sjúkrahústilfarunum. Eftirtektarverdur er hin størri

títtleikin hjá *pityriasis eczemi*. Eg haldi, at orsøkin er lutvíst hon, at pityriasis og pityriasis eczem eru heldur illa umboðað í sjúkrahústilfarunum, og lutvíst at pityriasis og tí eisini pityriasis eczem eru munandi tíðari sjúkur í Føroyum enn í Danmørk. Regnmikla og sólleysa veðurlagið í Føroyum man hava sína stóru skuld í hesum mikla títtleika.

Eins og væntandi er, er heldur nógv til av neurodermatittum, munandi meir enn í sjúkrahúsatilfarunum. Á hin bógvin koma *acne vulgaris* og *prurigo Besnier* fyri í sera líkum lutfalsligum títtleika. Hetta seinasta kundi merkt, at sjúklingar við *prurigo Besnier* nærum allir leita sær viðgerð. Fulli títtleiki sjúkunnar hjá hesum fólkunum er 0,15 %. Eg haldi meg vera fullvísan í, at mikil trygd er fyri hesum títtleika. Tá ið serlækni, ið er vorðin væl við fólkið, vitjar inn í hús og spyr um nakar hevur húðsjúku, er einki at ivast í, at hann fær samband við øll, ið fongd eru við hesa sjúku. Prurigo Besnier er so plágandi sjúka og tílíkur kleppur heima, at øll vilja leita sær ta hjálp fyri hana, ið fæst. Mær eru eingi tøl kunnug um, hvussu mong, ið áður hava havt prurigo Besnier, men nú eru loyst úr hesum meini.

At enda sigur 6. talva frá teimum sjáldsamastu húðsjúkunum í Føroyum. Onkur fer ivaleyst at undrast á her at finna sjúkur sum *epidermophytia pedum* og *verrucae plantae*.

*Epidermophytia* er nú vorðin ein sonn syndaplága í flestum størri býum, eins og m. a. SYLVEST (1948) hevur víst á. Vit geva tí gætur eftir, at bert eru 3 tilburðir við sjónligum epidermophytia. Vegna tann nógv nýtta gummifótbúnan, gummistivlar og gummiskógvar, átti fótasoppur, ið møguliga var fyri, at havt góðar vónir at sprottið fram og gjørst sjónligur. Tí kann haldast, at fótasoppur, ið hvussu er tá, ikki hevði fest røtur hjá føroyingum. Í hesum sambandi kann verða mint á, at á øllum tí kannaða økinum var eingin baðstova. At eingin tilburður av verrucae plantae er funnin hevur ætlandi somu orsøk.

6. talva. Sjáldsamastu húðsjúkurnar í Føroyum.
*The most infrequent skin diseases in the Faroe Islands.*

| | Tilburðir, tilsamans<br>*Cases, total* |
|---|---|
| Epidermophytosis of the feet | 3 |
| Verrucae plantae | 0 |
| Lupus vulgaris | 1 |
| History of lupus vulgaris | 2 |
| Boeck's sarcoid | 1 |
| Lupus erythematosus | 3 |
| Epithelioma | 2 |
| Bowen's disease | 1 |
| Erythema multiforme | 2 |
| Erythema nodosum | 1 |
| Erythema induratum Bazin | 1 |
| Syphilitic gumma with tabes dorsalis | 1 |
| Urticaria pigmentosa | 1 |
| Dermatitis herpetiformis | 4 |
| Exfoliative dermatitis | 2 |
| Pemphigus vulgaris | 0 |
| Epidermolysis bullosa | 0 |

Svend Lomholt (1927) hevur skrivað um føroyska ætt við *epidermolysis bullosa*, har 12 ættfólk høvdu sjúkuna. Henda ætt býr uttanfyri kannaða økið.

Tilfarið, ið her er lagt fram, er fyrsta sjúkuteljing av heilum fólkabólki. Tað snýr seg ikki um 1 millión, men um fólkabólk uppá 11.000. Men hann er kannaður á skipaðan hátt, og eg haldi, at tey tøl, her eru funnin, geva okkum eina hylling á, hvussu tíðum tey mein, ið vit dagliga fáast við, koma fyri hjá fólkinum.

Lars Hellgren er í løtuni við at fremja røð av væl fyrireikaðum títtleikakanningum av fyrikoming hjá húðsjúkum ymsastaðni í Svøríki. Áhugavert verður at bera úrtøku hansara saman við tað, ið her er lagt fram.

## SUMMARY

A census study, comprising 11,000 people on the Faroe Islands (Fig. 1) or one-third of the total Faroese population, was carried out to ascertain the absolute incidence of the various skin diseases. Since the main object of this study was to record psoriasis, this disease is not included in the analysis. The counting includes only cases of true dermatological diseases presenting themselves spontaneously, when the author visited the homes. All 1915 houses with 2341 households were visited. This disclosed 567 persons with skin diseases other than psoriasis, distributed on 663 diagnoses. Eczema showed an incidence of 1.54 p.c., pityriasis simplex and pityroid eczema 1.05 p.c., neurodermatitis 0.44 p.c., Besnier's prurigo 0.15 p.c., ulcer of the leg 0.15 p.c., and lichen ruber 0.13 p.c. The total incidence of skin diseases was 5.6 p.c. When including also psoriasis, which was traced even down to the very mildest cases, the incidence was 8 p.c.


## BÓKMENTIR


1. *Alderson, H. E. & Reich, A.*: Incidence of Dermatoses in a Student Health Service. Arch. of Dermat. & Syphil. 1937, 36: 56–61.
2. *Bereston, E. S. & E. M. Ceccolini*: Incidence of Dermatoses in Twenty Thousand Army Induction Examinations, with note on Syphilis with Negative Serologic Reactions. Arch. of Dermat. & Syphil. 1943, 47: 844.
3. *Butterworth, T. & Wilson McClellan Jr.*: Incidence of Diseases of the Skin in Feebleminded Persons. Arch. Dermat. & Syphil. 1938, 38: 203-9.
4. *Gilman, R. L.*: Incidence of Skin Diseases in a Student Health Service. The American Journal of Medical Sciences, 1934, 188: 268–270.
5. *Goodman, H.*: Statistics of the Ten Most Common Skin Diseases, based on an analysis of 973.090 published cases. Arch. of Dermat. & Syphil., 1929, 20: 186–188.
6. *Lomholt, G.*: Psoriasis í Føroyum. Fróðskaparrit (Annal. Societ. scient. Færoensis), 1953, 2: 129–149.
7. *Lomholt, G.:* Psoriasis on the Faroe Islands. A preliminary report. Acta Dermato-Venereologica, 1954, 34: 92.
8. *Lomholt, S.:* Epidermolysis bullosa med typisk familiær optræden. Dansk Dermatologisk Selskabs forhandlinger, 1927: 29.
9. *Rasmussen, K. A.:* Verrucae plantares, Symptomatology and Epidemiology. Acta Dermato-Venereologica, vol. 38, supplementum 39, København 1958, pp. 146.
10. *Sylvest, B.*: Undersøgelser over subjektiv symptomfri fodsvamp (Asymptomatic Ringworm of the Feet). København, Ejnar Munksgaard 1948, pp. 125.